# ÍF aftur millum tey bestu

**Fuglfirðingar eru fyri fyrstu ferð í fimm ár aftur í 1. deild, og nú hava teir styrkt seg við fleiri royndum spælarum fyri at standa seg í bestu deildini**

**ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR**
Postrúm 94
530 Fulgafjørður
Tlf. 444636 og 228771
www.if.fo

**STOVNAÐ:**
25. mars 1946

**FORMAÐUR:**
Rúni Petersen

**MEISTARAR (1):**
1979

**STEYPAVINNARAR:**
Ongantíð

**Í 1. DEILD (21 ÁR):**
1971-82, 1985, 1988-89, 1993-94, 1996-99, 2004

**Í EUROPA:**
Ongantíð

**Eyðun Klakstein**
*eydun@sosialurin.fo*



*Hanus Eliasen, sum her er í dysti við B36, er ein av teimum ungu og lovandi spælarunum, sum fuglfirðingar hava á liðnum í ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

ÍF hevði rættiliga vant seg við tilveruna í 1. deild, tá ið teir í 1999 ikki longur kláraðu at halda seg millum tey bestu. Tá høvdu teir verið í 1. deild síðani 1996, og tað hevði gingið rímiliga væl okkurt árið. Men so kom niðurtúrurin, og felagið hevði ilt við at fóta sær aftur.

Tey flestu høvdu roknað við, at ÍF fór at koma beina leið aftur í 1. deild, men soleiðis skuldi ikki verða. Royndirnar at vinna seg úr 2. deild miseydnaðust fleiri ár, og ikki fyrr enn í fjør kom aftur rættiligt flog yvir fuglfirðingar.

Tá vóru teir sannførandi í 2. deild og eru nú klárir til harða kampin um eitt av plássunum í 1. deild.

Sigfríður Clementsen, sum plagdi at vera vandamikil áleypari í HB og B36, hevði í fjør ábyrgdina av besta liðnum í Fuglafirði, og har vóru tey so væl nøgd við havnarmannin, at hann skal eisini stýra liðnum í 1. deild. Harafturat hevur Sigfríður eisini fingið ábyrgdina av at samaskipa ungdómsdeildirnar hjá felagnum, og hann er tí farin í fulltíðarstarv í ÍF.

## Fuglfirðingar heimaftur

Tá ið ÍF vann sær sessin í 1. deild var beinan vegin farið at tosa um, at nú skuldu fugfirðingarnir, sum hava spælt í øðrum feløgum, fáast heimaftur. Og tað eydnaðist eisini at lokka fleiri av teimum til Fuglafirðar aftur.

Bartal Eliasen, sum hevur drúgvar royndir frá 1. deildarfótbólti og landsliðnum, setti kósina heim til Fuglafjarðar, eftir at hann hevði spælt í GÍ. Saman við honum kom álopssinaði Bárður á Lakjuni, sum í fjør spældi allar landskappingardystirnar hjá GÍ. Ein annar vandamikil Lakjumaður er eisini komin aftur til ÍF at spæla, og tað er einki at ivast í, at Magni á Lakjuni verður ein fongur fyri ÍF-álopið. Hann hevur spælt nógv ár í høvuðsstaðarfeløgunum, og í fjør spældi hann við EB/Streymi.

ÍF hevur eisini lokkað tveir klaksvíkingar til felagið. Karstin Joensen, sum í fjør vardi málið hjá KÍ, valdi at skifta til Fuglafirðar, tá ið landsliðsmálverjin Jákup Mikkelsen kom aftur til KÍ, og útlitini fyri at fáa nógva spælitíð á besta liðnum ikki vóru av teimum bestu.

Rúni Elttør, sum í fjør skifti frá KÍ til B36, er eisini farin til Fuglafirðar at spæla.

Men tað eru ikki bara uttanífrá, at ÍF hevur fingið sær góðar spælarar. Í felagnum eru fleiri lovandi, ungir spælarar, og millum teirra teljast Hanus Eliasen og Høgni Zachariasen, sum báðir høvdu týðandi leiklut á liðnum í fjør.

ÍF miðjar eftir miðjuni í 1. deild, og liðið hevur eisini eitt spennandi bland av ungum og royndum spælarum, sum kunnu senda ÍF upp eftir stigatalvuni.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Karstin Joensen | | | KÍ |
| Fróði Poulsen | 14/0 | | |
| **Verja** | | | |
| Áki Petersen | 16/1 | | Skála |
| Rúni Eyðunsson Elttør | | | KÍ, B36 |
| Viggo Johannesen | 18/1 | | |
| Bartal Eliasen | | 4/0 | GÍ |
| Atli Petersen | 16/1 | | |
| Sverri Ellingsgaard | 14/0 | | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Eyðolvur R. Petersen | 18/5 | | |
| Árni Jóhan Petersen | 10/1 | | |
| Fritleif í Lambanum | 10/1 | | |
| Roy Róin | 11/2 | | |
| Eyðun Ryggshamar | 13/0 | | |
| Høgni Zachariassen | 16/7 | | |
| Jonn S. Thomsen | 12/0 | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| Hanus Eliasen | 18/9 | | |
| Høgni á Lakjuni | 7/1 | | |
| Magni á Lakjuni | | | HB, B36, EB/Streymur |
| Ken Bærentsen | 15/7 | | |
| Bárður á Lakjuni | | | KÍ, GÍ |
| **Tilgongd** | | | |
| Bárður á Lakjuni | 18/1 | | GÍ |
| Rúni Eyðunsson Elttør | 16/0 (0-0) | | B36 |
| Bartal Eliasen | 15/5 (5-0) | | GÍ |
| Magni á Lakjuni | 17/2 (0-1) | | EB/Streymur |
| Karstin Joensen | 18/-30 | | KÍ |
| **Frágongd** | | | |
| Jan Skoradal | 18/1 | | Givin |
| Heini Heinsson | 11/4 | | Givin |
| Rógvi Róin | 1/0 | | Givin |
| Rúni Petersen | 4/1 | | Givin |
| Jákup Helgi Egholm | 4/0 | | Givin |
| **Venjari** | | | |
| Sigríður Clementsen | | | |



# Magni leitar heimaftur

**Magni á Lakjuni hevur ikki spælt fast fyri barndómsfelagið í 11 ár, men nú verður hann eitt av álopsessunum. Magni heldur, at ÍF gongur ein spennandi framtíð ímóti**

**Eyðun Klakstein**
*eydun@sosialurin.fo*

Magni á Lakjuni var toppskjútti hjá fulgfirðingum, tá ið teir í 1993 yvirlivdu í 1. deild. Í næstseinasta umfari var avgerandi dystur ímóti leirvíkingum, og tá skoraði Magni eitt av málunum hjá ÍF, sum tryggjaði teimum 3-3 og harvið lívið í 1. deild.

Síðani 1993 hevur Magni ikki spælt fast við ÍF. Hann fór niður á skúla og var niðri til 1998. Onkuntíð vóru boð eftir honum, og hann fór heim at spæla fyri ÍF, men tað var ikki tað sama.

Tá ið Magni so flutti heim í august mánaði í 1998, flutti hann til Havnar at búgva, og har búgva hann, konan og bæði børnini framvegis.

Magni spældi fyrst við HB í hálvtannað ár, síðandi flutti hann til B36 í 1999, og í fjør royndi hann seg í EB/Streymi. Nú er hann so komin aftur til ÍF, har hann skal royna at gera mál fyri nýggja liðið í 1. deild.

– Hjartað hjá mær liggur framvegis í Fuglafirði, men eg havi ikki havt hug at spæla 2. deildarfótbólt, og tí hevur tað útilokað seg sjálvt at spælt við ÍF seinastu árini. Men nú var so ein møguleiki aftur, sigur Magni.

## Ungir gera gjøgnumbrot

Magni á Lakjuni hevur verið skapandi og vandamikil álopsspælari í B36, HB og EB/Streymi seinastu árini, og tað eru hesar dygdir, sum ÍF vónar at fáa gleði av komandi árið.

– Tað merkist, at fulgfirðingar veruliga taka undir við fótbóltinum nú. Eitt gott stuðulsfelag er virkið, og nógv verður fyri at hava góðar umstøður í felagnum. Tað hevur gjørt avgerðina at flyta til ÍF lættari, sigur Magni.

Tað hevur eisini spælt inn, at fleiri aðrir royndir 1. deildarspælarar eru komnir til ÍF.

– Eg kann einki einsamallur, og at tað eru komnir fimm spælarar við 1. deildarroyndum til ÍF, fer vónandi at styrkja liðið, sum eisini hevur fleiri spennandi ungar spælarar.

Magni heldur, at teir ungu spælararnir kunnu koma langt.

– Tað eru nógv talent í ÍF, men tað er sjálvandi ein vansi, at teir hava bara spælt í 2. deild seinastu árini. Tað er munur á bestu og næstbestu deildini, og tí mugu teir eitt gear upp. 1. deild fer at krevja meira av teimum, men eg rokni við, at onkur av teimum ungu fer at fáa veruligt gjøgnumbrot í ár.

## Ferðin ov nógv til teknikkin

Tað eru liðin 11 ár, síðani Magni spældi fast við ÍF, og hann ásannar, at nógv er broytt hesi árini.

– Bæði í ÍF og í føroyskum fótbólti er nógv hent hesi árini. Føroyskur fótbóltur hevur ment seg nógv, spælið gongur nógv skjótari, og tað verður spælt meira við kroppinum. Tað er langt frá altíð, at tekniska støðið klárar at fylgja ferðini, og tí enda nógvir dystir við tilvildarligum spæli og nógvari ferð, heldur Magni.

Hann heldur, at umstøðurnar til fótbólt eru góðar í Fuglafirði.

– Nú er nýtt graslíkið lagt á vøllin, og tað er stórt framstig. Gamli vøllurin var slitin og ringur at spæla á, men nú eru umstøðurnar á vøllinum sera góðar. ÍF hevur ikki møguleikarnar, sum HB og B36 hava við sínum húsum, men umstøðurnar í Fuglafirði eru útmerkaðar.

Hann heldur, at tað er umráðandi, at ÍF klárar at verða við í 1. deild komandi árini.

– Eysturoyggin hevur í løtuni seks 1. deildarlið, men tað verður neyvan framyvir. Eg rokni við, at tað verður umráðandi at etablera seg í 1. deild komandi árini, og um eg kann hjálpa ÍF við tí, so eri eg fegin, sigur Magni.

**Metingin**

ÍF hevur styrkt sær um liðið við fleiri royndum 1. deildarspælarum. Samstundis hevur liðið fleiri spennandi, ungar spælarar. Hetta eigur at hava við sær, at ÍF kann liggja eitt vet framman fyri botnliðini.



*– Hjartað hjá mær liggur framvegis í Fuglafirði, sigur Magni á Lakjuni, sum nú fer aftur at spæla við ÍF*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Meira tíð til familjuna

Magni koyrir úr Havnini og til Fuglafjarðar, tá ið hann skal venja, og hóast ein biltúrur upp á ein lítlan tíma hvønn vegin kann ljóða av nógvum, so hevur hann í grundini fingið betri tíð til familjulívið, síðani hann flutti úr Havn og út á bygd við fótbóltsspælinum.

– Eg havi vant 2-3 ferðir um vikuna í Fuglafirði higartil, og harafturat havi eg runnið sjálvur í Havn. Í grundini havi eg fingið betur til familjuna nú, enn tá ið eg spældi í Havn og vandi næstan hvørt kvøld, sigur hann.

Hann og Rúni Elttør plaga at koyra saman úr Havnini, og tá ið teir venja í Havn, avgera teir í grundini sjálvir, nær á degnum, teir eru í gongd.

– Skalt tú spæla fótbólt í 1. deild, so er neyðugt við stuðli heimanífrá, og tað er gott at fáa meira av tíð til at vera saman við konuni og børnum, sigur Magni.

## Opin kapping

Landskappingin í 2004 verður ein opin kapping millum fleiri feløg, heldur Magni. Hann roknar við, at HB, B36 og KÍ fara at liggja á fremstu plássunum, men frá fjórða plássinum og heilt aftur verður kappingin opin.

– Vit kunnu eins væl enda sum nummar fýra sum fleiri av hinum liðunum. Málið hjá ÍF má vera at koma at liggja í miðjuni á stigatalvuni. Eingin er áhugaður at liggja í einum botnstríði alt árið, og eg haldi eisini, at vit hava spælararnar til at blanda okkum upp í longri uppi, sigur Magni.

– Spurningurin er, um vit klára at fáa støðug úrslit. Vit eru sjálvandi fleiri spælarar, sum hava spælt nógv í 1. deild, men helvtin av liðnum liggur kanska um 20 ára aldur, og hópurin er kanska ikki so breiður sum hjá teimum stóru feløgunum. Tí úrslitini gerast óstøðug.

Men Magni á Lakjuni ætlar sær at gera sítt til, at barndómsfelagið hjá honum fer at standa seg væl í 1. deild komandi árið.